Álit

í

løgtingsmáli nr. 103/2020: Uppskot til løgtingslóg um økisnøvn á internetinum (Netøkisnavnalógin)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 5. mars 2021, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2021 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 8. og 13. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Elektron, FO-ráðið, Trygdartøkni og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Ein **samd nevnd** hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið um netøksinavnalóg snýr seg um neyðugar dagføringar í mun til lógarverk og skipanir kring umsiting av teimum netøkisnøvnum, sum Føroyar í dag hava og í framtíðini fáa rættin til. Uppskotið skipar karmarnar fyri umsitingina og nýtsluna av .fo økisnøvnum á internetinum. Eisini setir tað reglur fyri atkomu, krøv til gjøgnumskygni og hevur ásetingar um trygd og eftirlit við umsitingini av økisnøvnum á internetinum.
Tað er sera gott, at greiðar reglur nú verða ásettar fyri eftirlitið við KT-trygdini. Eftirlit við umsitingini av økisnøvnum og eftirlit við trygdini hava heilt avgerandi týdning fyri økisnøvn á internetinum, sum partur av kritiska undirstøðukervinum í landinum.

Í dag hevur FO-ráðið, umsitingina av økisnavn.fo, og ráðið útveitir dagligu umsitingina av økinum, sum í dag er hjá privatu fyritøkuni Trygdartøkni Sp/f.
Tað er FO-ráðið, ið ásetir handilstreytirnar fyri keyp, gjald, upplýsingar osfr., sum eru galdandi fyri nýtsluna av tænastunum á keypsportalinum økisnavn.fo. FO-ráðið er sjálvsogarnarstovnur, og sostatt ikki almennur stovnur undir landinum.

Við lógini fær landsstýrismaðurin heimild at bjóða umsitingina av økisnøvnum út, tó so, at haldast skal fram við verandi meginreglu um, at umsitingin skal útinnast á einum kostnaðargrundaðum og ikki-yvirskotsgevandi støði (non-profit).

Vinnuevndin vísir á, at kostnaðurin av økisnøvnum, hóast prísurin lækkaði fyri fáum árum síðan, framvegis er hægri enn í grannalondum okkara. Og at landsstýrismaðurin má tryggja, at árliga gjaldið fyr økisnavn er so bíligt, sum til ber.

Nevndin heldur tað vera gott, at reglur um góðan økisnavnasið nú verða greitt ásettar. Hóast uppskotið ikki nevnir dømir, so kann sambært tí, sum er komið fram í nevndini, til dømis vera talan um at leggja seg á nøvn hjá øðrum, at útvega økisnøvn, sum eru happandi ella niðurgerandi móti øðrum osfr.
Somuleiðis verður, aftaná skiftistíð, ikki longur loyvi at keypa sær økisnøvn einans við leigu- ella víðarisølu fyri eyga.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 20. apríl 2021

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	